gult cyan magenta svart

– *Fysrti samrá›ingarfundurin var veruliga ótespiligur. Hann tók hart uppá meg persónliga. Eg føldi meg drignan í kring á einum leikpalli, sigur løgma›ur*

Mynd. Jens Kristian Vang

Væntar ákoyringar frá baklandinum

Fyrsti samrá›ingarfundur vi› danir var persónliga har›ur fyri Anfinn Kallsberg. Hann kendi seg drignan í kring á einum palli. Í dag skal hann standa skúlarætt fyri ákoyringum á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum. Men samstundis fær hann dygga álitisváttan frá føroyska fólkinum

Interwiev
John Johannessen

Í dag skal Anfinn Kallsberg standa skúlrætt fyri baklandinum í Fólkaflokkinum. Hann skal á landsfundinum taka ímóti rísi og rósi og grei›a frá um leiklut sín í førda politikkinum hjá landsst‡rinum.

Sjálvur roknar Anfinn Kallsberg vi› einum lívligum fundi, har fullveldistilgongdin ver›ur høvu›smáli›. Og hann ivast onga løtu í, at hann fer at fáa onkra skoluna.

– Í Fólkaflokkinum er ta› solei›is, at vit hava nógvar persónsmenskur, i› siga sína meining beint út, og eg ivist onga løtu í, at eg bæ›i fari at fáa rís og fáa rós, solei›is plagar ta› at vera, sigur Anfinn Kallsberg.

Men hóast skolurnar, kann Anfinn Kallsberg troysta seg vi›, at hann fær dygga persónliga álitisváttan í n‡ggjastu veljarakanningini. Eina av orsøkunum til hetta metir hann vera sítt diplomatiska lyndi.

Semja er loysnin

Tá Hvítabók var li›ug og landsst‡ri› fyri umlei› einum ari sí›ani veruliga fór undir fullveldisætlanina, royndi løgma›ur hetta diplomatiska lyndi›. Hann kalla›i anstø›una til kaffifundir í Tinganesi fyri at vita, um ta› bar til at fáa eina semju vi› andstø›una um eina fullveldisætlan.

Løgma›ur hevur nevniliga sí›ani samgongan var› skipa› lagt dent á, at ta› er ney›ugt at fáa eina brei›a politiska semju í Føroyum um ríkisrættarliga spurningin.

Men higartil hevur ta› ikki eydnast løgmanni at funni› semjuna. Kaffifundirnir góvu ikki naka› ítøkiligt úrslit og landsst‡ri› fór í gongd vi› samrá›ingar vi› danir uttan stu›ul frá andstø›uni. Hesar samrá›ingar eru sí›ani miseyna›ar og landsst‡ri› hevur lagt ein n‡ggjan leist fyri sjálvst‡ristilgongdina.

Hesin leistur hevur aftur givi› Anfinni Kallsberg vónina um, at ta› fer at eydnast at finna teirri brei›u semjuna.

– Samrá›ingarnar, sum vit hava havt, hava gjørt nøkur ting grei›ari fyri okkum. Vit vita nú, hvør stø›an hjá donsku stjórnini er og hvørjar møguleikar vit hava. Myturnar um ymisku loysnirnar á málinum eru burtur eftir samrá›ingarnar, og tí haldi eg, at vit nú hava eitt gott grundarlag at byggja eina semju á, sigur løgma›ur.

Anfinn Kallsberg ætlar sær nú enn einafer› at royna at finna brei›u semjuna vi› at bjó›a andstø›uni til kaffifundir at vi›gera n‡ggju ætlanina hjá landsst‡rinum.

– Vit skulu samansjó›a sjónarmi›ini hjá teimum, sum ynskja eina skjóta loysn, eina lagaliga loysn og at enda teimum, sum seta tey bleytaru økini fram um fullveldi, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur heldur, at víddin millum ymisku meiningarnar í Føroyum um fullveldismáli› er farin at smalka, og tí roknar hann vi›, at ta› um ikki so langa tí› fer at bera til at finna brei›u semjuna.

– Eftir útmeldingina frá Jóannesi Eidesgaard um, at Javna›arflokkurin er meira sjálvst‡rissinna›ur enn n‡ggi leisturin hjá samgonguni, rokni eg vi›, at ta› í øllum førum fer at bera til at fáa Javna›arflokkin vi› í eina ætlan, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur roknar harafturat eisini vi›, at ta› fer at bera til at fáa stu›ul frá Sambandsflokkinum til at yvirtaka málsøki eftir heimast‡rislógini. Í hesum sambandi vísir hann á, at hetta er naka›, sum Sambandsflokkurin fleiri fer›ir hevur sagt seg kunna taka undir vi›.

Persónliga hart

Ta› hevur mangan leika› hart á millum flokkarnar í Føroyum í sambandi vi› fullveldismáli›. Men samrá›ingarnar vi› danir hava eisini veri› ógvuliga har›ar. Hetta hevur løgma›ur eisini merkt persónliga.

– Fysrti samrá›ingarfundurin var veruliga ótespiligur. Hann tók hart uppá meg persónliga. Eg føldi meg drignan í kring á einum leikpalli, sigur løgma›ur.

Men samstundis hevur Anfinn Kallsberg lært naka› av hesum.

– Til teir seinnu fundirnar hev›i eg fyrireika› meg mentalt frammanundan. Eg havi lært, at ta› ikki ber til at taka slík bakkøst at sær, sigur Anfinn Kallsberg.

Eftir tann har›a fyrsta samrá›ingarfundin, var ta› upplyftandi hjá løgmanni at koma til annan samrá›ingarfundin, sum eftir hansara tykki gekst væl.

– Tri›ji fundurin var aftur sum tann fyrsti, men tá var eg mentalt fyrireika›ur, og tók eg hann tí ikki eins tungt, sum tann fyrsta, sigur løgma›ur.

Undan fjó›ra fundinum hev›i løgma›ur ikki gó›ar vónir. Hann rokna›i vi›, at hetta fór at ver›a seinasti fundurin, og at hann einki úrslit fór at geva.

– Men eg havi aldri á›ur kent meg so vísan í mínum grundgevingum, sum á tí fjó›ra fundinum, sigur Anfinn Kallsberg og vísir til grundgevingar sínar í sambandi vi› spurningin, hvørt Føroyar eru tjó› ella ikki.

Hóast ta› var á hesum fundinum, at samrá›ingarnar slitna›u, heldur Anfinn Kallsberg kortini, at eitt gott úrslit kom burtur úr fundinum.

– Vit fingu á hesum fundinum at vita, at vit sjálv gera av, nær vit hava fullveldi. Danska stjórnin bo›a›i beinlei›is frá, at hon vil gó›kenna eitt ynski um fullveldi, um meiriluti er fyri tí í Føroyum. Ta› er naka›, sum vit kunnu fegnast um, sigur løgma›ur.

Nyrup er har›ur

Hóast løgma›ur er vónsvikin av samrá›ingunum vi› danir, hevur hann einki persónligt ímóti mótstø›umanninum, Poul Nyrup Rasmussen.

– Nyrup er ógvuliga har›ur í samrá›ingum. Hann vil ikki, at Føroyar skulu fara úr Danska ríkinum, og tí kunnu vit ikki vænta› okkum nakra hjálp frá dønum í fullveldismálinum. Nyrup er har›ur og kontantur og gevur avgjørt ikki naka› vi› dyrnar.

– Men Poul Nyrup Rasmussen skal sjálvsagt tæna donskum áhugamálum. Var eg hann og vildi eg ikki, at ein partur skuldi fara úr ríkinum, so hev›i eg gjørt ta› sama, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur ásannar, at Poul Nyrup Rasmussen hevur veri› har›ari at samrá›ast vi›, enn hann hev›i vænta›. Men hann dugir ikki at siga um hør›u samrá›ingarnar beinlei›is hava havt avlei›ingar fyri vi›urskifini millum Danmark og Føroyar.

– Eg skal lata vera vi› at siga, at samrá›ingarnar hava órógva› vi›urskiftini, men ta› er klárt, at ta› eru framstig gjørd á nøkrum økjum, me›an einki er hent á ø›rum økjum. Hví hetta er skal eg lata vera vi› at siga naka› um.

Hóast samanbrestirnar á samrá›ingarfundunum, samstarva Anfinn Kallsberg og Poul Nyrup Rasmussen væl í gerandisdegnum.

– Ta› er ikki solei›is, at vit ikki eru uppá talufót og ikki kunnu halda eitt skilagott samskifti. Vit hava vanliga eitt gott og regluligt samskifti, sigur Anfinn Kallsberg.

Eingin idealsamgonga

Vit spyrja løgmann, hvussu hansara idealsamgonga hev›i sæ› út.

– Eg haldi ikki, at eg skal gera meg klókan uppá idealsamgonur. Tá tú setur eina samgongu saman veldst ta› um, hvat mál tú setir tær fyri komandi valskei›.

– Tú kanst aldri snikka eina idealsamgongu saman, solei›is sum politiski heimurin í Føroyum er í løtuni. Ta› besta hev›i veri›, at ta› var ein flokkur – sjálvandi Fólkaflokkurin – sum hev›i reinan meiriluta, so hev›i bori› til at ført reinan fólkaflokspolitikk, sigur løgma›ur.

Men samstundis vísir Anfinn Kallsberg á, at tá ein samgonga ver›ur gjørd, skriva flokkarnir í veruleikanum eina n‡ggja stevnuskrá í samgonguskjalinum.

– Í samgonguskjalinum er ney›ugt at geva og taka, um tú vilt hava eina semju. Ta› vi› siga, at tú ert noyddur at ni›urprioritera nøkur øki fyri at fáa onnur øki uppprioritera›. Hetta geri eg alt eftir, hvat eg haldi vera mest ney›ugt at loysa í tí tí›arskei›num, samgongan skal virka.

Í hesum sambandi vísir løgma›ur á, at Fólkaflokkurin slaka›i í sínum borgarliga politikki, tá hann fór í samgongu vi› Tjó›veldisflokkinum fyri at fáa eina loysn á ríkisrættarliga spurninginum.

– Tann borgarligi politikkurin, sum vit høvdu ynskt okkum, var› heilt náttúrligt settur til sí›is, tá hendan samgongan var› skipa›. Av tí, at vit uppprioritera›u sjálvst‡ri saman vi› Tjó›veldisflokkinum, máttu vit ni›urprioritera borgarliga politikkin, sigur Anfinn Kallsberg.

Harafturat vísir løgma›ur á, at ta› eru fleiri borgarligir málsetningar, sum samgongan setti sær fyri, tá hon var› skipa›, sum enn ikki er komin á mál vi› orsaka› av, at ein vinstrahallur flokkur er í samgonguni. Millum anna› nevnir løgma›ur skattalættan.

Tískil heldur løgma›ur ikki, at ta› kann sigast, at ta› hevur eydnast Fólkaflokkinum at føra fullkomnan borgarliga politikk afturfyri at lova Tjó›veldisflokkinum fullveldi.

Samstarv vantar

Anfinn Kallsberg heldur, at politiska skipanin, sum hon er nú, hevur nakrar vansar. Politikarar hava ikki vant seg vi› n‡ggju st‡risskipanarlógina, og tí vanta nakrar mannagongdir.

Millum anna› kundi Anfinn Kallsberg hugsa› sær, at andstø›an var meira vi› í politiska arbei›inum.

– Í Føroyum er ta› samgongarn, sum førir politikkin, me›an andstø›an er alt ov líti› vi›, og í sta›in bert skal strí›ast at vera ímóti øllum.

– Eg kundi hugsa› mær, at vit funnu eina skipan, har andstø›an var› tikin meira vi› í fyrireikingina av t‡dningarmiklum málum, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgma›ur vísir á, at politiska arbei›i› hev›i veri› betur, um ta› hev›i større breidd. Var andstø›an vi› til at fyrireika stórmál, høvu tey hóska betur til allar partar, og harafturat hev›i andstø›an tiki› málini til sín, sum síni egnu, tá hon kom í samgongu.

Í Danmark er vanligt, at andstø›an er til hoyringar hjá ymsu rá›harrunum um ymisk mál. Ta› er ein líknandi skipan, sum Anfinn Kallsberg kundi hugsa› sær.

Men løgma›ur roknar ikki vi›, at ta› fer at eydast at fáa í lag slíka si›venju fyrr enn um tvey valskei› ella so.

Anfinn Kallsberg vónar at fáa loyst ríkisrættarliga spurningin sum skjótast, so farast kann aftur undir veruligan politikk.

gult cyan magenta svart

– Í Føroyum er ta› samgongarn, sum førir politikkin, me›an andstø›an er alt ov líti› vi›, og í sta›in bert skal strí›ast at vera ímóti øllum, sigur løgma›ur (Mynd: Jens Kristian Vang)

Løgma›ur heldur, at víddin millum ymisku meiningarnar í Føroyum um fullveldismáli› er farin at smalka, og tí roknar hann vi›, at ta› um ikki so langa tí› fer at bera til at finna brei›u semjuna.

Mynd: Jens Kristian Vang